# *Føroyar í slupptíðini*

## Frágreiðing um eina fólkalívsfrøðiliga innsavning

*Jóan Pauli Joensen, Andras Mortensen og Jógvan Ravnsfjall*

Í innganginum til bókina »Færøske slupp-fiskere«, ið viðger lívið umborð á sluppunum í tíðarskeiðinum 1900—1939[1], verður víst á, at tað eisini var sera umráðandi at fáa kannað lívið á landi í Føroyum í sama tíðarskeiði. Leingi hevði verið ætlað at fara undir innsavning av tilfari til hesa rannsókn[2], og í 1979 varð av álvara farið undir hetta tiltak. Føroya Fornminnissavn skipaði fyri hesum rættiliga stóra innsavningararbeiði[3]. Byrjað varð við eini fyrireikandi innsavning várið 1979, og fyrst í desember 1979 varð spurnablaðið »Føroyar í slupptíðini« sent út. Jóan Pauli Joensen hevur staðið fyri innsavningini. Andras Mortensen, stud. mag., og Jógvan Ravnsfjall, savnvørður, hava verið hjálparmenn í innsavningararbeiðinum.

Høvuðsendamálið við rannsóknini er at lýsa broytingina frá bóndasamfelag til fiskivinnusamfelag, soleiðis at verkliga, samfelagsliga og andliga mentanin verður lýst sum ein heild. Ætlanin er at lýsa tað sum broyttist og tað sum stóð við. Rannsóknararbeiðið er ætlað at fara fram sum ein sínámillum ávirkan av innsavning, bókmenta- og skjalanýtslu, soleiðis at nýggir spurningar alsamt verða reistir. At enda skuldi tað so borið til at tikið saman um teir spurningar, sum hava verið avgerandi fyri samfelagsligu og mentanarligu gongdina. Í hesum fyrsta tátti av rannsóknini verður bert sagt frá sjálvari innsavningini og tí innsavnaða tilfarinum. Annar táttur verður at nýta tað innsavnaða tilfarið saman við upprunaligum skjølum, ársfrágreiðingum, álitum, dagbókum o.ø., sum kann hava týdning fyri at lýsa tíðarskeiðið. Í tíð fevnir rannsóknin frá endanum av 18. øld til 2. heimsbardaga, høvuðsdenturin verður lagdur á 20. øld.

### Tann fyrireikandi innsavningin

Várið og summarið 1979 tosaðu vit við 45 fólk, 17 kvinnur og 28 menn, serliga á Tvøroyri, í Vági og í Klaksvík. Heimildarfólkini vórðu vald á tann hátt, at vit spurdu okkum fyri hjá fólki, sum so vístu okkum á tey, sum vit komu at tosa við. Í fyrstuni høvdu vit einki spurnablað, men skrivaðu bert okkurt upp so hissini, sum vit ætlaðu at spyrja um. Evnið, sum vit løgdu dent á at fáa nakað at vita um, var fiskaarbeiði í síni

Fróðskaparrit 31. bók (1983): 94-103.

heild. Tað tilfar, sum Fróðskaparsetrið hevði fingið við ritgerðakappingini um fiskaarbeiði í 1971, var okkum til góða hjálp[4].

## Spurnablaðið

Við støði í tí kunnleika og teimum royndum, sum vit fingu í tí fyrireikandi innsavningararbeiðinum, skrivaði Jóan Pauli Joensen spurnablaðið »Føroyar í slupptíðini«, sum er nr. 17 í røðini av spurnabløðum, sum Føroya Fornminnissavn hevur sent út. Dentur var lagdur á at seta upp spurningarnar so breiðar og opnar sum møguligt. Spurnablaðið varð skrivað á maskinu og offsettprentað í 1500 eintøkum. Permuna hevði Bárður Jákupsson teknað og lagt til rættis.

Spurnablaðið telur 14 bls. Fyrst er ein vegleiðing til spurnablaðið, og so koma spurningarnir bólkaðir í 22 høvuðsbólkar, sum eru:

1. Upplýsingar um navn o.a.
2. Heimið
3. Ljós og hiti
4. Matur og matgerð
5. Innløgur og annað
6. Dýrahald
7. Velting, hoygging, urtagarðar o.a.
8. Klæðir
9. Handlar og handilsvørur
10. Fiskaarbeiði
11. Fiskagentur
12. Annað kvinnuarbeiði
13. Annað arbeiði í bygdini
14. Útróður
15. Útróður við motorbáti og innstalleringi
16. Seiðaberg, fara á flot og onnur veiði av landi ella nærhendis landi
17. Fjarfiskiskapurin og bygdin
18. Trolarar, útróður uttan fyri Føroyar, fremmand fiskifør o.a.
19. Hátíðarhald og veitslur
20. Annað samband manna millum
21. Frítíðin
22. Bøkur, frásagnir, siga søgur o.a.
23. Kristnilívið
24. Felagsvirksemi
25. At vera barn og vaksa upp í slupptíðini
26. Ymiskt

## Úrvalið av heimildarfólki

Samstundis sum spurnablaðið fór til prentingar, fóru vit undir at velja út heimildarfólk. Frá byrjan varð avgjørt at heimildarfólkið skuldi veljast tilvildarliga innan ávísar karmar av heimildarmetingarligum og praktiskum orsøkum. Manntalið 22. september 1977 sýndi, at 10.000 fólk í Føroyum vóru fødd fyri 1926. Hetta ár høvdu vit sett sum mark fyri føðingarár hjá heimildarfólkunum. Tey yngstu skuldu sostatt verið um konfirmatiónsaldur, tá 2. heimsbardagi brast á. Vit settu okkum fyri at velja umleið 1000 fólk at senda spurnablað til.

Ynskið var, at heimildarfólkini skuldu veljast tilvildarliga, kortini so, at allar bygdir vóru umboðaðar. Í samarbeiði við Petur Zachariassen, lektara á Støðisútbúgvingini, Fróðskaparsetri Føroya, gjørdu vit eitt yvirlit yvir føroysku bygdirnar og støðd teirra. Vit funnu fram til eina mannagongd at gera úrvalið eftir. Við støði í talvu 1 fóru vit so undir at leita eftir heimildarfólkunum í fólkayvirlitinum (kommunukartotekinum) fyri 1979.

**1. Talva**

| Bygdabólkar: | Tal: | Úrvalstal: |
|---|---|---|
| 1. 100 | 62 | øll tald við |
| 2. 100—249 | 21 | 6 |
| 3. 250—499 | 13 | 8 |
| 4. 500—999 | 14 | 10 |
| 5. 1000—2000 | 4 | 12 |
| 6. Klaksvík | 1 | 16 |
| 7. Tórshavn | 1 | 20 |

Í bygdum sum høvdu færri enn 100 fólk skuldu vit skriva øll upp fødd fyri 1926. Úr bygdunum í bólki 2 taldu vit øll og valdu 6. hvørt. Í bólki 3 8. hvørt o.s.fr. Tey úrvaldu vórðu uppskrivað á kort við navni, føðingar-

degi, bústaði og yrki. Rættiliga skjótt komu vit kortini til ta niðurstøðu, at neyðugt var at gera undantøk frá mannagongdini. Í teimum smáu bygdunum vóru fleiri eldri fólk enn í bygdunum yvirhøvur, og tí komu færri fólk at verða vald har enn tað sum fyrisett varð í mannagongdini. Í Havn og Klaksvík vóru viðurskiftini so nógv øðrvísi í mun til hinar bygdirnar, at vit gjørdu av ikki at fylgja uppsettu mannagongdini har heldur, men valdu nøkur fólk so hissini at umboða Havnina og Klaksvík.

Úrvalið var at enda gjørt, og øll tey uppskrivaðu vórðu eftirkannað. Undir hesum eftirkanningum varð onkur strokin av listanum. At enda høvdu vit so 771 fólk eftir, sum vit sendu spurnabløðini.

**Spurnablaðið verður sent**

Av tilvild kom tann av okkum sum stóð fyri rannsóknini eitt leygarkvøld at luttaka í eini útvarpssending, sum kallaðist »prát og plátur«, har innsavningin m.a. kom at verða umrødd. Seinni varð eisini høvi til at halda ein fyrilestur um evnið »Føroyar í slupptíðini« í útvarpinum, har nágreiniligari varð greitt frá innsavningini. Henda sending hevði við sær, at fleiri onnur enn tey tilvildarliga valdu bóðu um at fáa spurnablaðið. Eftir stuttari tíð høvdu 86 fólk biðið um tað.

Spurnablaðið varð sent við postinum fyrst í desember 1979. Í brævbjálvanum lá:

1. eitt vegleiðandi bræv
2. eitt skjal at senda aftur við fráboðan um ein fór at svara ella ikki
3. eitt skjal at skriva persónligar upplýsingar á
4. 20 ørk av skrivipappíri
5. umbønarskjal til meira pappír
6. ein brævbjálvi í A4 stødd
7. ein brævbjálvi í A5 stødd
8. spurnablaðið »Føroyar í slupptíðini«.

Tað var ikki neyðugt at seta frímerki á brævbjálvarnar, postgjaldið varð goldið av Fornminnissavninum. Eftir stuttari tíð høvdu 175 fólk boðað frá, at tey ætlaðu sær at fara at svara spurnablaðnum; 190 fólk boðaðu frá, at tey ikki fóru at svara og sendu okkum alt aftur; 5 brævbjálvar komu aftur, tí postverkið fann ikki fram til fólkini, sum brøvini vóru send til. Teimum 401 fólkunum, sum eftir vóru, hoyrdu vit einki frá. Vit høvdu roknað við, at tey flestu ynsktu at vit skuldu koma til teirra við bandupptøkutóli, so tey kundu tosa svarini inn á band okkara, men so var ikki. Bert ein lítil partur ynskti hetta, tey allarflestu ynsktu sjálv at skriva ella fáa onkran av sínum at hjálpa sær. Hetta gjørdi innsavningina ódýrari, tí at ferðaútreiðslurnar gjørdust væl minni enn upprunaliga roknað við.

Vit settu okkum straks í samband við tey fólk, sum vildu hjálpa okkum sum heimildarfólk. Freistin at svara spurnabløðunum var sett til 1. apríl 1980. Tey, sum ikki høvdu sent okkum svar, tá aprílmánaður var av, fingu áminningarskriv sendandi. Øll svaraðu ikki, sum høvdu ætlað tað. Hinvegin vísti tað seg, at ein rættiliga stórur partur av teimum 401 fólkunum, sum ikki lótu frætta frá sær í fyrstu atløgu, svaraðu.

Bárður Jákupsson hevði evnað til eitt prýðiligt takkarskriv, sum vit sendu øllum teimum, sum svaraðu spurnablaðnum og sum annars lótu okkum upplýsingar í sambandi við innsavningina. Á hesum skrivi er frásagnarnummarið hjá tí einstaka heimildarfólkinum viðmerkt.

**Svarini sum komu aftur**

771 spurnabløð vórðu send út til sama tal

av fólkum. Aftur at hesum komu so 86 spurnarbløð, sum fólk høvdu biðið um. Til samans vóru sostatt 858 spurnabløð send. Av hesum fingu vit 175 svar aftur, og svarar hetta til 20% av teimum spurnabløðum, sum vit sendu út. Hvussu býtið er millum menn og kvinnur, sæst á talvu 2. Sum tað sæst, hava vit sent spurnabløð til færri kvinnur enn menn. Í mun til talið á kvinnum sum fingu spurnablaðið og talið á kvinnum, sum svaraðu er teirra svarprosent 17%, miðaltalið fyri mannfólkini roknað á sama hátt er 22%.

**2. Talva**

| | Útsendar eindir: | | Afturkomin svar: | | Svarprosent: |
|---|---|---|---|---|---|
| Menn | 548 | 64% | 121 | 69% | 14% |
| Kvinnur | 310 | 36% | 54 | 31% | 6% |
| Samanlagt | 858 | 100% | 175 | 100% | 20% |

**3. Talva**

| | 1. úrval | | 2. úrval | | Útsendingin: | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Menn | 625 | 52% | 464 | 60% | 464 + 83 | % 548 | 64% |
| Kvinnur | 576 | 48% | 307 | 40% | 307 + 3 | % 310 | 26% |
| Samanlagt | 1201 | 100% | 771 | 100% | | 858 | 100% |

Svarprosentið er sostatt minni fyri kvinnur enn fyri menn.

Sum longu nevnt, var miðað ímóti at fáa úrvalið av heimildarfólkunum so tilvildarligt sum gjørligt. Á talvu 3 sæst eisini, at munurin millum mannfólk og konufólk við fyrsta úrvali ikki var størri enn at hann kundi verið tilvildarligur. Við eftirkanningina í 2. úrvali verða eftir øllum at meta fleiri kvinnur strikaðar av listanum enn menn. Hetta er ikki gjørt miðvíst ella medvitandi og gevur okkum tískil meira at hugsa um. Eisini í teirri fyrireikandi innsavningini er talið á kvinnum minni enn talið á monnum. Orsøkin til tann heilt stóra munin millum umboðanina av kvinnum og monnum er, at millum tey 86 fólkini, sum bóðu um spurnablaðið, vóru bert 3 kvinnur.

### Staðfrøðiligt yvirlit yvir gongdina í innsavningini

Á kortinum á bls. 100 er yvirlit yvir allar tær bygdir, haðan vit hava minst eitt svar; hetta er viðmerkt við einum svørtum ringi. Á talvu 4 er øll mannagongdin í innsavningini lýst við tølum. Tann gamla markatalsskipanin er grundarlagið undir staðarlýsingini. Hetta er tann staðfrøðiliga skipan, sum verður nýtt á Føroya Fornminnissavni.

**4. Talva**

*Staðfrøðilig greining av tilfarinum.*

| | Bygd | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Sumba | 12 | 10 | 10 | 0 | 3 | 5 | 4 |
| | Akraberg | | 2 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | Akrar | | 12 | 4 | 0 | 0 | 1 | 1 |
| | Lopra | 4 | 6 | 5 | 0 | 0 | 1 | 0 |
| | Víkarbyrgi | | 9 | 4 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 12 | Vágur | 35 | 12 | 12 | 0 | 1 | 9* | 4 |
| 13 | Nes | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 14 | Porkeri | 10 | 12 | 12 | 3 | 0 | 2 | 2 |
| 15 | Hov | 6 | 9 | 6 | 0 | 3 | 2 | 1 |
| 16 | Fámjin | 6 | 8 | 7 | 0 | 2 | 2 | 2 |
| 17 | Øravík | | 11 | 6 | 0 | 2 | | |
| | Øravíkarlíð | | 18 | 5 | 0 | 2 | 2 | 5 |
| 18 | Trongisvágur | 10 | 8 | 8 | 0 | 1 | 10* | 7 |
| 19 | Froðba | 8 | 8 | 8 | 0 | 1 | 0 | 0 |
| | Tvøroyri | 29 | 14 | 12 | 0 | 1 | 18* | 8 |
| 20 | Hvalba | 17 | 12 | 9 | 1 | 1 | 4 | 1 |
| | Sandvík | 5 | 9 | 6 | 0 | 2 | 2 | 3 |
| 21 | St. Dímun | | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 22 | Skúvoy | 4 | 10 | 6 | 2 | 0 | 3 | 2 |
| 23 | Skarvanes | | 6 | 2 | 0 | 1 | 1 | 1 |
| 24 | Dalur | | 19 | 7 | 0 | 3 | 3 | 3 |
| 25 | Húsavík | 4 | 7 | 7 | 1 | 2 | 3 | 2 |
| 26 | Skálavík | 9 | 7 | 9 | 0 | 4 | 5 | 6 |
| 27 | Sandur | 15 | 12 | 17 | 3 | 3 | 6 | 4 |
| | Skopun | 14 | 8 | 10 | 2 | 3 | 2 | 4 |
| 28 | Sandavágur | 18 | 12 | 12 | 1 | 3 | 3 | 2 |
| | Slættanes | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 29 | Miðvágur | 23 | 11 | 12 | 0 | 4 | 3 | 3 |
| | Vatnsoyrar | | 13 | 3 | 0 | 1 | 1 | 0 |
| 30 | Sørvágur | 24 | 5 | 11 | 1 | 5 | 8* | 7 |
| 31 | Bøur | | 12 | 5 | 0 | 1 | 0 | 0 |
| 32 | Gásadalur | | 12 | 4 | 0 | 1 | 1 | 1 |
| 33 | Mykines | | 13 | 5 | 0 | 0 | 2 | 2 |
| 34 | Koltur | | 1 | 1 | 0 | 1 | 1 | 1 |
| 35 | Hestur | | 20 | 7 | 0 | 1 | 1 | 1 |
| 36 | Nólsoy | 11 | 9 | 6 | 0 | 2 | 3 | 3 |
| 37 | Kirkjubøur | | 9 | 2 | 0 | 1 | 1 | 0 |
| | Argir | 21 | 6 | 6 | 0 | 2 | 2 | 2 |
| 38 | Velbastaður | | 17 | 7 | 0 | 2 | 2 | 1 |
| 39 | Syðradalur | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 40 | Norðradalur | | 3 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 41 | Skælingur | | 4 | 2 | 0 | 1 | 0 | 0 |
| 42 | Leynar | | 15 | 5 | 0 | 0 | 1 | 1 |
| | Stykkið | | 6 | 3 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 43 | Kvívík | 9 | 8 | 7 | 2 | 2 | 1 | 1 |
| | Nesið/Válur | | 17 | 3 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 44 | Vestmanna | 26 | 13 | 12 | 8 | 1 | 2 | 2 |
| 45 | Saksun | | 11 | 5 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 46 | Tjørnuvík | | 29 | 7 | 3 | 1 | 2 | 1 |
| | Nesvík | | 2 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 47 | Haldórsvík | 9 | 7 | 4 | 0 | 0 | 1 | 1 |
| | Langasandur | | 5 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 48 | Streymnes | 6 | 6 | 5 | 0 | 2 | 2 | 1 |
| 49 | Hvalvík | 6 | 7 | 6 | 0 | 2 | 1 | 0 |
| 50 | Hósvík | 7 | 7 | 5 | 0 | 1 | 2 | 2 |
| 51 | Kollafjørður | 16 | 10 | 12 | 2 | 6 | 4 | 3 |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 52 | Kaldbak | | 28 | 7 | 0 | 2 | 3 | 3 |
| | Kaldbaksbotnur | | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 53 | Sund | | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 54 | Hoyvík | 14 | 6 | 7 | 0 | 2 | 1 | 1 |
| | Hvítanes | | 17 | 6 | 0 | 2 | 2 | 2 |
| 55 | Tórshavn | 145 | 28 | 33 | 7 | 6 | 4 | 8 |
| 56 | Strendur | 16 | 10 | 15 | 2 | 4 | 2 | 3 |
| | Innan Glyvur | | 11 | 4 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | Kolbeinargjógv | | 3 | 2 | 0 | 1 | 1 | 0 |
| 57 | Selatrað | | 28 | 7 | 0 | 1 | 0 | 0 |
| | Morskranes | | 8 | 5 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 58 | Oyri | 5 | 4 | 3 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | Oyrarbakki | | 4 | 4 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 59 | Norðskáli | 5 | 6 | 3 | 0 | 0 | 3 | 3 |
| 60 | Eiði | 13 | 12 | 17 | 10 | 10 | 11 | 11 |
| | Ljósá | | 2 | 2 | 1 | 0 | 1 | 1 |
| | Svínáir | | 8 | 4 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 61 | Gjógv | 4 | 13 | 14 | 2 | 5 | 8 | 8 |
| 62 | Funningur | 5 | 9 | 8 | 1 | 3 | 4 | 3 |
| 63 | Skáli | 14 | 9 | 9 | 0 | 1 | 0 | 0 |
| | Skálafjørður | | 13 | 5 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 64 | Elduvík | | 20 | 19 | 0 | 4 | 2 | 3 |
| | Funningsfjørður | | 17 | 4 | 0 | 2 | 1 | 1 |
| 65 | Oyndarfjørður | 7 | 8 | 8 | 1 | 4 | 6 | 5 |
| 66 | Fuglafjørður | 31 | 11 | 10 | 7 | 7 | 12* | 10 |
| | Hellurnar | | 22 | 7 | 0 | 1 | 1 | 2 |
| 67 | Leirvík | 17 | 10 | 12 | 0 | 1 | 3 | 3 |
| 68 | Norðragøta | 11 | 7 | 8 | 3 | 3 | 4 | 5 |
| 69 | Gøtugjógv | | 9 | 8 | 0 | 1 | 0 | 0 |
| 70 | Syðragøta | 10 | 8 | 11 | 1 | 7 | 7 | 6 |
| | Undir Gøtueiði | | 8 | 4 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 71 | Søldarfjørður | 8 | 7 | 7 | 2 | 1 | 1 | 1 |
| | Skipanes | | 14 | 4 | 0 | 1 | 2 | 2 |
| 72 | Lambi | 4 | 7 | 5 | 0 | 0 | 1 | 1 |
| 73 | Glyvrar | 12 | 6 | 7 | 0 | 0 | 1 | 1 |
| | Saltangará | 13 | 6 | 6 | 1 | 5 | 7 | 4 |
| | Runavík | 11 | 5 | 4 | 0 | 1 | 1 | 0 |
| 74 | Toftir | 15 | 10 | 11 | 2 | 1 | 1 | 2 |
| | Saltnes | | 7 | 7 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | Rituvík | 4 | 10 | 9 | 0 | 1 | 0 | 0 |
| 75 | Nes | 7 | 7 | 7 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | Æðuvík | | 12 | 4 | 0 | 2 | 2 | 2 |
| 76 | Syðradalur K | | 7 | 5 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 77 | Húsar | | 20 | 7 | 0 | 1 | 1 | 1 |
| 78 | Mikladalur | | 21 | 6 | 1 | 1 | 1 | 2 |
| 79 | Trøllanes | | 3 | 2 | 0 | 1 | 2 | 1 |
| 80 | Kunoy | | 21 | 9 | 0 | 1 | 2 | 2 |
| 81 | Haraldssund | | 13 | 5 | 0 | 1 | 3 | 3 |
| 82 | Skarð | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| 83 | Norðoyri | | 9 | 4 | 0 | 0 | 1 | 1 |
| 84 | Klaksvík | 70 | 16 | 17 | 16 | 3 | 18* | 7 |
| 85 | Strond | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | Ánirnar | | 9 | 6 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 86 | Skálatoftir | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 87 | Múli | | 6 | 3 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 88 | Depil | | 2 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | Norðdepil | 6 | 6 | 6 | 0 | 3 | 1 | 1 |
| 89 | Norðtoftir | | 4 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 90 | Árnafjørður | | 24 | 8 | 0 | 0 | 2 | 1 |
| 91 | Hvannasund | 6 | 6 | 6 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 92 | Viðareiði | 10 | 6 | 6 | 0 | 2 | 3 | 5 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 93 | Svínoy | 37 | 10 | 1 | 2 | 1 | 1 |
| 94 | Kirkja | 19 | 6 | 0 | 4 | 3 | 3 |
| 95 | Hattarvík | 15 | 7 | 0 | 0 | 1 | 2 |
| Samanlagt | | 1083 | 709 | 86 | 175 | 255 | 216 |

* merkir at tilfar frá tí fyrireikandi innsavningini og annað innsavnað tilfar eisini er roknað uppí.

**Frágreiðing til talvu 4**

1. Tal á fólkum, sum áttu at umboða ta einstøku bygdina sbrt. mannagongdini í talvu 1. Einki tal er sett fyri bygdir við færri enn 100 fólkum.
2. Tal á fólkum, sum vórðu úrvald í fyrsta umfari í teimum einstøku bygdunum.
3. Tal á fólkum, sum fingu spurnablaðið eftir at eftirkanningar vóru gjørdar.
4. Tal á fólkum, sum bóðu um at fáa spurnablaðið.
5. Tal á fólkum, sum boðaðu frá, at tey fóru at senda svar.
6. Tær bygdir, sum eru umboðaðar við tilfari. Summi heimildarfólk umrøða tvær ella fleiri bygdir, hetta er orsøkin til at endatalið er størri enn heildartalið á heimildarfólkum, sum saman við heimildarfólkunum frá tí fyrireikandi innsavningini er 227.
7. Tal á heimildarfólkum, sum eru fødd í teimum ymisku bygdunum. Summi heimildarfólk hava ikki upplýst, í hvørjari bygd tey eru fødd, tí verður endatalið 216. Uppgerðin byggir á sama grundarlag sum 7. teigur.



**Varðveiting og skráseting av innsavnaða tilfarinum**

Tilfarið er goymt og skrásett á Føroya Fornminnissavni og er at finna millum frásagnarnr. 700—1000 í frásagnarsavni Fornminnissavnsins. Tilfarið frá teirri fyrireikandi innsavningini er at finna millum frásagnarnr. 700—760. Tilfarið er skrásett í teirri røð, sum tað er komið inn. Hetta hevur havt við sær, at summi heimildarfólk eru skrásett undir fleiri frásagnarnumrum. Smærri uppskriftir, sum eru gjørdar í sambandi við innsavningina, eru skrásettar undir Fsnr. 973. Sum er, er seinasta Fsnr. 974, men av tí at vit vænta okkum fleiri svar, hava vit goymt numrini upp til 1000.

Samanlagt er tilfarið skrásett við 274 frásagnarnumrum, sum tilsamans 227 heim-

ildarfólk hava latið, av teimum eru 72 kvinnur og 155 menn. Tað eru samanlagt 71 bandaðar samrøður á 97 bondum. Bondini verða avskrivað so við og við, og avskriftirnar verða skrásettar í frásagnasavninum, har frásagnarnummar er bílagt hvørjum bandi.

Av øllum tilfarinum eru 175 beinleiðis svar upp á spurnablaðið, summi av hesum svarum eru á bandi, men meginparturin er uppskrivaður. Hesum partinum av tilfarinum er greitt frá frammanundan. Hini 52 fólkini hava latið tilfar, sum ikki beinleiðis er skipað eftir spurnablaði.

## Støddin á tilfarinum roknað í blaðsíðum

Av tí at alt tilfarið er av handskrivaðum uppskriftum, maskinskrivaðum uppskriftum, avskrivaðum bandupptøkum og leyslig blaðsíðuútrokning av teimum bandupptøkum, sum enn ikki eru avskrivaðar, er torført at rokna seg fram til eina vanliga blaðsíðu. Tí hava vit roknað eina blaðsíðu sum eina blaðsíðu uttan mun til, um hon er handskrivað, maskinskrivað, avskrivað eftir bandi ella óavskrivað bandupptøka roknað um til blaðsíður. Roknað soleiðis er alt tilfarið 8.354 bls. Miðalblaðsíðutalið fyri tey einstøku heimildarfólkini er 36 bls. Hvussu blaðsíðutalið annars býtir seg eftir heimildarfólkunum sæst á talvu 5.

**5. Talva**
*Býtið av heimildarfólkum eftir blaðsíðutali.*

| Síðutal: | Heimildarfólk: |
|---|---|
| Minni enn 10 | 21 |
| 10-30 | 97 |
| 31-50 | 67 |
| 51-70 | 24 |
| 71-90 | 8 |
| 91-110 | 3 |
| 111-130 | 1 |
| 131-150 | 1 |
| 151-170 | 3 |
| 171-190 | 1 |
| 191-210 | 0 |
| 211-230 | 0 |
| 231-250 | 1 |
| Samanlagt | 227 |

**6. Talva**
*Aldursbýtið á heimildarfólkunum.*

| Føðingarár: | Heimildarfólk: |
|---|---|
| 1880—85 | 2 |
| 1886—90 | 5 |
| 1891—95 | 11 |
| 1895—00 | 19 |
| 1901—05 | 41 |
| 1906—10 | 59 |
| 1911—15 | 36 |
| 1916—20 | 30 |
| 1921—25 | 19 |
| Ikki upplýst | 6 |
| Samanlagt | 227 |

## Aldurs- og starvsbýtið hjá heimildarfólkunum

Heimildarfólkini eru sum longu nevnt tilvildarliga vald millum fólk fødd til og við 1925. Størsti parturin av heimildarfólkinum er føddur í tíðarskeiðinum 1901—1915. Hvussu aldursbýtið annars er, sæst á talvu 6.

Teir flestu vanligu føroyingar hava verið í vinnu av ymiskum slag, tí er ofta torført at geva teimum eitt ávíst starvsheiti, t.d. gevur onkur heimildarmaður okkum 6 ymisk starvsheiti at velja ímillum. Maður kann hava verið fiskimaður sum ungur og er seinni vorðin arbeiðsmaður, ella hevur fingið sær onkra útbúgving. Ein húsmóðir kann hava verið fiskagenta sum ung og so hildið uppat, meðan ein onnur kann hava arbeitt í fiski mestsum alt lívið. Á talvu 7 er gjørt eitt yvirlit yvir starvsheitini hjá heimildarfólkunum. Tað sæst av hesum, at tey yvirhøvur umboða miðalføroyingin.

**7. Talva**
*Starvstilknýtið hjá heimildarfólkum.*

| Starvsbólkar: | Heimildarfólk: |
|---|---|
| 1. Fiskimenn og sjómenn | 65 |
| 2. Skiparar, maskinmeistarar og stýrimenn | 13 |
| 3. Arbeiðsmenn | 23 |
| 4 Handverkarar við útbúgving | 5 |
| 5. Handverkarar uttan útbúgving | 4 |
| 6. Handilsfólk og keypmenn | 8 |
| 7. Krambakallar og krambagentur | 4 |
| 8. Starvsfólk og embætismenn | 9 |
| 9. Lærarar | 8 |
| 10. Trúboðarar, rithøvundar o.o. | 5 |
| 11. Starv innan heilsuverkið | 3 |
| 12. Bøndur og jarðarbrúkarar | 18 |
| 13. Húsmøður og arbeiðskonur | 4 |
| 14. Fiskagentur | 14 |
| Samanlagt | 227 |

## Heimildarmetingarligur samandráttur

Tað innsavnaða tilfarið er roknað sum grundarlag undir eini dygdarligari og ikki nøgdarligari rannsókn. Tað verður ikki sett sama krav til ta umboðandi nøgdina sum í teimum kanningum, har svarið verður ja, nei og veit ikki. Kortini hava vit roynt at skipa innsavningina soleiðis, at hon skal vera umboðandi við støði í einum tilvildarligum úrvali. Vit mettu, at tað hevði týdning, at heimildarfólkini vórðu vald tilvildarliga, soleiðis at tað ikki var staðbundin meting av fólkunum, sum kom at vera galdandi fyri úrvalið. Við at nýta ein tilvildarligan úrvalshátt hava vit heldur ikki tikið nakran fram um annan. Sum nevnt er umboðanin av kvinnum í minna lagi í tilfarinum, men talið á kvinnum er kortini so stórt, at hetta ikki er heimildarmetingarligur spurningur av týdningi.

Smábygdirnar eru sera væl umboðaðar við heimildarfólkum; hetta kann ikki altíð sigast um tær størru bygdirnar og serliga ikki um Havnina og Klaksvík. Tað kann tí koma at vera neyðugt at gera meiri nágreiniliga innsavning í hesum bygdum seinni.

Svarini upp á spurnablaðið eru, sum vera man, meira einsháttað enn tað tilfar, sum er savnað uttan spurnablað. Hin vegin er tað galdandi fyri bæði hetta tilfar eins og svarini upp á spurnabløðini, at sínámillum eru tey rættiliga ólík. Summi svara stutt og knapt, onnur við breiðum lýsandi frágreiðingum við nágreiniligum lýsingum og nógvum dømum. At ikki øll evni hava havt sama áhuga hjá heimildarfólkunum sæst eisini á tilfarinum. Av týdningi í hesum sambandi er tað, at sama spurnablað er sent kvinnum og monnum.

Tað tilfar, sum vit hava savnað, er um hendingar og fyribrigdi fyri minst 45 árum síðan, tað er tí ikki løgið, um minnið er vorðið ávirkað av hugsjónum og hugburði, sum fólk hava fingið seinni í lívinum. Hetta er ikki minst galdandi fyri fatanina av samfelagsligum spurningum, har sumt verður krógvað, meðan annað verður tikið fram. Tey flestu minnast onkra hending frá smábarnaárunum, men vanliga er tað ikki fyrr enn í skúlaaldrinum og so við og við, sum børnini koma í samband við teir ymisku partarnar í lívinum, at tey av álvara fara at minnast samanhangandi. Fólk hava lyndi til at greiða frá tí elsta í minni sínum. Í okkara føri skuldu heimildarfólkini kunnað sagt frá allari tíðini frá seinast í 19. øld til 2. heimsbardaga. Tað ber ikki til at koma inn á sannleikavirðið í hvørjari einstakari uppskrift; tað má verða tikið upp, tá tilfarið verður nýtt. Tað er kortini alt sum bendir á, at tað tilfar, sum vit hava savnað, er álítandi. Hetta tilfar lýsir tíðina, sum tað einstaka menniskjað sá og upplivdi hana; tilfarið má tí eisini verða nýtt saman við upprunaligum heimildum frá samtíðini, sum tað er nevnt í innganginum.

Henda kanning verður annar táttur í rannsókanini.

### Nýtsla av tilfarinum

Á 150-ára føðingardegi Føroya Sparikassa kom bókin »Fiskafólk. Ein lýsing av føroyska húshaldinum í slupptíðini« út. Henda bók byggir fyri størsta partin á tilfar, sum er savnað í sambandi við hesa rannsóknina.[5] Eisini hevur Fornminnissavnið skipað fyri eini framsýning um »Fiskafólk« á ólavsøku 1983. Bæði føroyskir og útlendskir studentar hava sýnt stóran áhuga fyri tilfarinum, t.d. kann verða víst á, at Karsten Sedal hevur nýtt tilfar frá innsavningini í magistararitgerð síni um føroyskar traðarmenn.[6] Á Fornminnissavninum verður alsamt arbeitt við hesum tilfari. Eingin kann kortini sleppa fram at tí uttan við serligum loyvi.

**Viðmerkingar:**

1 Jóan Pauli Joensen: Færøske sluppfiskere. Etnologisk undersøgelse af en erhvervsgruppes liv. Tórshavn 1975, bls. 10.

2 Longu í 1976 var ætlanin at fara undir hesa rannsókn. Tá fekk Jóan Pauli Joensen granskingarstyrk frá Statens Humanistiske Forskningsråd fyri at gera eina rannsókn av samfelagsligu og mentanarligu gongdini í Føroyum í broytingini frá bóndasamfelagi til fiskivinnusamfelag. Sum partur av hesi rannsókn komu hesi rit til: Jóan Pauli Joensen: Føroysk Fólkamentan. Bókmentir og gransking. Fróðskaparrit 26. bók, Tórshavn 1978; Jóan Pauli Joensen: Färöisk folkkultur. En översikt. Lund 1980; Jóan Pauli Joensen: Tradition och miljö i faröisk fiske. Í Tradition och miljö. Red. Lauri Honko och Orvar Löfgren, Lund 1981. Hesi nevndu rit byggja á heimildir, sum vóru til skjals. Sjúka gjørdi, at einki innsavningararbeiði varð gjørt í hesum sambandi.

3 Rannsóknin fekk dyggan stuðul frá Carlsbergfondet. Hon er umrødd í ársritinum hjá hesum grunninum: Jóan Pauli Joensen: Fra bondesamfund til fiskersamfund. Carlsbergfondet, Årskrift. Rhodos, København 1982. Rannsóknararbeiðið hevur seinni eisini fingið stuðul frá Statens Humanistiske Forskningsråd og Føroya Landsstýri.

4 Hetta tilfar er til skjals á Fróðskaparsetri Føroya, og var kappingin um fiskaarbeiði fyrsta ritgerðakapping, sum Fróðskaparsetrið skipaði fyri í 1970/71.

5 Jóan Pauli Joensen: Fiskafólk. Ein lýsing av føroyska húshaldinum í slupptíðini, Tórshavn 1982. Føroya Sparikassi gav bókina út á 150-ára degi sínum 24. august 1982.

6 Karsten Sedal: Færøske trøbrugere. En etnologisk undersøgelse af trøbrugernes eksistensvilkår og dagligliv ca 1770—1970. Magisterafhandling i europæisk etnologi. Institut for europæisk folkelivsforskning, Københavns Universitet, Maj 1983.

## Summary

The Faroe Islands from about 1900 to the Second World War. A report on an ethnological survey.

In 1975 the Faroese Museum embarked on an extensive project in order to collect information on life and conditions in the Faroe Islands, from the turn of the century up to the Second World War. Questionnaires were sent out, and tape recordings made of interviews. Of primary importance in the gathering of this information was a fourteen-page questionnaire, of which 858 copies were sent out and 175 were completed and returned. This gives a reply rate of 20%, which must be regarded as reasonable for this type of survey. Besides these replies, the survey includes material of a less structured nature. In all, 227 people have contributed information. The collected material amounts to 8500 pages. The report describes the actual work of collecting the material, the questionnaire, and how it was distributed. Finally, there is a list showing the topographical distribution of the material. Tables show the age and social position of the informants, and the number of pages per record. A map shows which villages are represented in the survey. The report ends with a short critical evaluation.